# Den fantastiske bus

(Tann fantastiski bussurin, Niels Jákup Thomsen, BFL, 2024)
Rithøvundur og myndprýðari: Jakob Martin Strid (DK)
Gyldendal 2023

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2024

Søgugongd: Í Tann fantastiski bussurin gera vinirnir av at hjálpa lítla Timo, sum er vorðin sjúkur. Vinirnir gera av at byggja ein heilt serligan buss, sum skal føra vinirnar á eina langa ferð til eydnulandið Balanka, har tey hitta ótrúligar skapningar og vóna at finna blómuna við lekjandi megi.

Evni: gandur, hugflog, ferð, vinalag, marrusamfelag

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES við teimum allaryngstu

**Hygg at permuni. Hvat síggja tit? Hvussu nógv djór finna tit í bussinum? Kenna tit djórini? Hvat gera tey?**

**Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**Lesið bókina saman og tosið um søguna. Hvussu hevði tykkara fantasibussur sæð út? Hvagar høvdu tit farið við fantasibussinum?**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at permuni. Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**2. Hvørji djór eru við í søguni?**

**3. Hvat halda tit um bussin?**

**4. Hvussu hevði tykkara fantasibussur sæð út? Hvat skal hann kunna? Hvagar høvdu tit farið við bussinum? Hvør skal við? Hvør stýrir bussinum?**

**5. Brúka títt hugflog og tekna og lita ein fantasiskan bus.**

### MIÐLINGAR

**1. Søgan byrjar við eini dronu. Hvat brúkar mann eina dronu til?**




**2. Fru Friby stúrir fyri, at hon ikki hevur kunnað hitað lítla Timo nóg væl, av tí at hann er eitt súgdjór og hon eitt skriðdjór. Hvør er munurin millum súgdjór og skriðdjór?**

**3. Hyggið at karakterunum á síðu 11 og tosið saman um hvørji djór, teir ymsu karakterirnir eru.**

**4. Húsið hjá Lucas verður rivið niður, og Tolstoj bjóðar honum at flyta inn hjá sær. Hevði tú bjóðað einum vini í neyð heim til tín?**

**5. Vinalag fyllir nógv í bókini. Dugir tú at finna nøkur dømi?**

**6. Ímynda tær, at tú skalt sniðgeva ein fantastiskan buss til tín og vinir tínar. Hvussu skuldi hann sæð út? Tú kanst kaga í bókina og finna íblástur t.d. á s. 26, 54 og 56 og hugsa um, hvørjar lutir bussurin skal hava (motor, dekk, veingir, fleiri hæddir o.s.fr.) Ger eina skitsu við bussinum og øllum lutunum. Hevur bussurin nakrar serligar eginleikar? Kann hann koyra í øllum veðri? Hvat kann bussurin?**

**7. Nýt ein tóman mjólka- ella saftpakka til tín fantasibuss og mála hann eftir tínum hugflogi. Klipp út hurð og vindeygu og innrætta bussin við ymiskum smálutum.**

### TEY STØRRI BØRNINI

**1. Hvat halda tit um bókina? Minnir hon um aðrar søgur, tit hava lisið?**

**2. Hvat er hent í Ahnstarr City? Hvussu uppliva tit býin?**

**3. Hvussu hevði tú samskift uttan internet?**

4. Vinirnir skulu út at leita eftir safran-liljum, sum skulu gera lítla Timo frískan. Kenna tit fleiri blómur ella urtir, sum kunnu lekja fólk? Hvar í heiminum finnast lekjandi urtir og blómur?

5. Hvat hevði tú gjørt, um ein vinur gjørdist sjúkur og tørvaði hjálp?

6. Hvat er geislavirkni?

7. Hygg at síðunum 152-155. Tosið saman um tað, tit síggja á myndunum. Hvat fáa gudarnir tykkum at hugsa um?

8. Hyggið at síðu 180 og tosið um, hvussu tónleikur kann fáa blómur at vaksa.

9. Í bókini hittir tú karakterir, sum eru sjúkir, fátækir og heimleysir. Tosið saman um evnini og finnið loysnir uppá avbjóðingarnar hjá vinunum í bókini.

10. Arbeiðið í bólkum og gerið eina teknirøð við einum fantasibussi og eini tilhoyrandi søgu. Tit kunnu umhugsa at taka tað við, sum tit hava tosað um í uppgávunum frammanundan, og sniðgeva bussin eftir tí. Hugsið um innrætting, ferðafólk, ferðamál o.a.

---

**LES EISINI:**
**Tá Mumbo Jumbo varð risastórur eftir Jakob Martin Strid**
**Koira nimeltään Kissa eftir Tomi Kontio og Elina Warsta**
**Arvedávgeriikii eftir Mary Ailonieida Sombán Mari og Sissel Horndal**

---

## MÁLBITIN

# "Ferð"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Resa | Rejse | Reise | Ferðalag | Ferð | Angalaneq | Veli | Mátki |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!